# Skipasmiðjurnar eru ikki so hart raktar av verkfallinum

**- Men tað merkist, at arbeiðsmenninir ikki eru til arbeiðis. Hesir plaga at mála og gera annað fyrifallandi arbeiði, sigur Gunnar Mohr, stjóri á Skála Skipasmiðju**

VERKFALL
*Vilmund Jacobsen*



*Á Tórshavnar Skipasmiðju arbeiða teir umborð á fýra skipum í løtuni, harav Váðasteinur fær nýggjan motor. Á Skála Skipasmiðju liggja tvey skip, Teistin og Niels Pauli*

Tilsamans 20-30 arbeiðsmenn eru ikki til arbeiðis á Tórshavnar Skipasmiðju og Skála Skipasmiðju, nú verkfall er.

Gunnar Mohr, stjóri á Skála Skipasmiðju, sigur, at einir 10-15 mans, sum arbeiða á Skála, eru við hús, og umleið sama tal er við hús í Havn.

Á Skála Skipasmiðju arbeiða tilsamans 80 fólk; á Tórshavnar Skipasmiðju 160.

Hetta merkir, at talið av handverkarum lutfalsliga er nógv størri í Havn enn á Skála.

Gunnar Mohr sigur, at tað merkist, nú arbeiðsmenninir ikki eru til arbeiðis. Hesir plaga at mála og gera annað fyrifallandi arbeiði.

- Men málingalíkindini hava ikki verið nakað serlig í seinastuni.

### Lítið virksemi

Stjórin á Skála Skipasmiðju sigur, at tað er meira smáligt við arbeiði á Skála í løtuni.

- Vit arbeiða umborð á strandfaraskipinum, Teistanum og djúpvatnstrolaranum, Niels Paula.

Gunnar vísir á, at Teistin, sum ikki hevur verið í dokk í tvey ár, er til eftirlit og vanligt viðlíkahald.

Spurdur, hvussu skipið, sum er bygt á Skála Skipasmiðju, hevur roynst, sigur Gunnar, at tað hevur roynst væl.

- Eg haldi, at Teistin bert hevur lagt ein dag burtur ímillum, síðan skipið fór í sigling, sigur hann.

Niels Pauli skal hava aksiltrekk, og generatorurin skal umvælast.

Gunnar sigur, at onnur skip eru ikki í ljósmála beint nú, og hann væntar ikki, at nakað serligt verður á »tapetinum«, fyrr enn verkfallið er av.

### Váðasteinur fær nýggjan motor

Á Tórshavnar Skipasmiðju er eisini nakað at gera.

- Vit hava ein íslendskan bát her í løtuni. Síðan hava vit Tind, Norðheim og Váðastein, sum fær nýggjan motor.

Gunnar Mohr sigur, at tað mesta av tí, ið gjørt verður við skipini, er vanligt viðlíkahald og ymiskar umvælingar.

## Gunnar Mohr nýggjur stjóri



*Gunnar Mohr, sum nú er stjóri á Skála Skipasmiðju, hevur saman við faðiri sínum, Poul Mohr, verið stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju síðan 1999*

STJÓRASKIFTI
*Vilmund Jacobsen*

1. apríl tók havnamaðurin, Gunnar Mohr, við sum stjóri á Skála Skipasmiðju eftir Marna Olsen, sum eisini er havnamaður.

Gunnar, sum er sonur veteranin innan skipasmiðjuvirksemi í Føroyum, Poul Mohr, hevur drúgvar royndir innan hetta yrki. Hann hevur starvast á Tórshavnar Skipasmiðju síðan 1990 og hevur saman við Poul Mohr verið stjóri síðan 1999.

Nýggi stjórin á Skála er 43 ára gamalur.

Umleið 80 fólk starvast á Skála Skipasmiðju.

## Arbeiðarafeløgini í Klaksvík ikki blotnaði

**- Tá ið tann tímalønti vil hava meira løn fyri sítt arbeiði, verður rópt upp um, at vinnan og samfelagið fara á húsagang. Hinvegin hoyrist lítið um slíkt, tá ið tað eru tey alment løntu, sum fáa lønarhækkingar, ið framleiðsluvinnan og harvið tann tímalønti noyðast at bera, sigur Hergerð Joensen, næstformaður í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag**

VERKFALLIÐ
*Vilmund Jacobsen*

Herfyri gingu søgur um, at arbeiðarafeløgini í Klaksvík vóru farin at umhugsa sín stuðul til Føroya Arbeiðarafelag, nú verkfallið dregur út og setir síni spor – ikki minst vinnuliga.

### Tætt sum eggið

Hergerð Joensen, næstformaður í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, sigur, at einki er í hesum søgum og sigur, at hesa heilsu kunnu vit bera teimum, sum hava hoyrt slíkar søgur.

- Feløgini her norðuri stuðla verkfallinum 100%, og hetta er ikki minst galdandi eftir semingsroyndina seint hóskvøldið. Tú kanst heilsa og siga, at vit eru ikki blotnaði, men standa tætt sum eggið saman við hinum feløgunum, sigur hon.

Hergerð vísir á, at arbeiðarafeløgini hava víst samráðingarvilja við at fara niður á 6 krónur um árið í lønarkrøvum í mun til upprunaliga uppskotið, sum var tilsamans 16,48 krónur í tvey ár.

- Eg haldi, at semingsmenninir ganga alt ov nógv eftir, hvat teir halda, at arbeiðsgevararnir kunnu góðtaka. Teirra uppgáva er at finna loysnir, og vanligt er undir slíkum samráðingum at finna millumloysnir. Arbeiðarafeløgini hava ongantíð fingið tað, tey hava biðið um, og tað vistu vit, at vit heldur ikki fóru at fáa hesaferð.

### Kenna seg spottaði

Hon vísir á, at fyrra semingsuppskotið gav teimum tímaløntu eina hækking uppá tilsamans 3,20 krónur og uppskotið, sum kom á borðið seint hóskvøldið, gav 2,75 krónur um árið í tvey ár umframt eitt prosent í eftirløn.

- Eg haldi, at hetta kann kallast at halda tey tímaløntu fyri spott, sigur Hergerð.

Hon vísir á, at tað er levind og gangur, hvørja ferð tey tímaløntu, sum eru niðast á lønarstiganum, vilja hava nøkur oyru aftrat í løn.

- Jú, tá verður rópt upp um, at vinnan og samfelagið fara á húsagang. Hinvegin hoyrist lítið um slíkt, tá ið tað eru tey alment løntu, sum fáa lønarhækkingar, ið framleiðsluvinnan og harvið tann tímalønti noyðast at bera, sigur Hergerð Joensen.



**Formaðurin í Starvsmannafelagnum heldur, at landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hevur verið óvanliga klossutur og provokerandi í sínum fráboðanum í sambandi við lønarsamráðingarnar. Løturnar hava verið illa valdar, sigur hann**



*Útmeldingarnar hjá Karsteni Hansen hava verið illa »timaðar«, klossutar og provokerandi, sigur formaðurin i Starvsmannafelagnum, sum skal samráðast við Fíggjarmálaráðið um nýggjan sáttmála í heyst*

# Ógvuliga klossut og provokerandi

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Edvard Joensen*

— Tað er ógvuliga harmiligt, at landsstýrismaðurin við fíggjarmálum skuldi koma so klossut og provokerandi upp í lønarsamráðingarnar, sum hann gjørdi, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum. Tað er sera óheppið, at hann valdi so skeivar løtur at koma við sínum fráboðanum. Tað er einki minni enn fakfelagsfrælsið, sum stendur í vanda.

Formaðurin í Starvsmannafelgnum, Gunleivur Dalsgarð, er, milt sagt, ikki fegin um luttøkuna hjá Karsteni Hansen, landsstýrismanni við fígjarmálum, í samráðingargongdini á arbeiðsmarknaðinum higartil.

— »Timingin« hjá honum hevur verið ógvuliga óheppin, staðfestir Gunnleivur Dalsgarð. Fyrst kemur hann og sigur, at hann ikki góðkennir SEV sáttmálan, samstundis sum semingsmenninir eru innkallaðir. Í øðrum lagi kemur hann, samstundis sum semingsmenninri hava kallað inn av nýggjum, og sigur, at tað er als ikki grundarlag fyri nakrari lønarhækking yvirhøvur. Hann klossar í tí, so tað foslær, sigur starvsmannaformaðurin.

Starvsmannafelagið skal til lønarsamráðingar við Lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum í heyst, og tað væntar formaðurin ikki fara at verða lættar samráðingar, sum útmeldingarnar nú eru.

— Men landsstýrismaðurin skal vita, at vita ætla okkum at leggja okkara egna støði, tá vit fara at samráðast. Tað ber ikki til, at treytirnar eru settar av landsstýrismanninum frammanundan, staðfestir Gunnleivur Dalsgarð avgjørdur.

Hann vísir á, at feløgini fara tilsamráðingar í teirri trúgv, at talan er um opnar samráðingar, har allir partar eru reellir. Partarnir eiga at tóna reint flagg og leggja allar avtalur fram, sum galdandi eru á økinum.

Hann sipar her til sáttmálan, sum gjørdur varð millum Maskinmeistarafelagið og SEV.

Siðvenjan hevur veirð, at teir sáttmálar, sum gjørdir eru, eisini hava verið galdandi. Men nú kemur landsstýrismaðurin knappliga og sigur at hann góðkennir ikki sáttmálan, uttan tó at koma við nakrari formligari fráboðan, fyrr enn rykt verður eftir henni.

— Tað er einki løgið, at tað skapar rumbul, vísir Gunnleivur Dalsgarð á. Tí Maskinmeistarafelagið hevur verið til samráðingar í góðari trúgv uppá, at framferðin verður, sum hon plagar at vera. Gjørt varð ikki vart við annað undan samráðingunum.

Til tað, sum landsstýrismaðurin meldaði út í øðrum umfari, um, at eingin lønarhæking kann verða, tí ráð eru iki til tað, sigur Gunleivur Dalsgarð, at hatta var ein ófatiliga vánaligur boðskaður at koma við.

— Vit vita, hvat rørist í samfelagið okkara, og landsstýrismaðurin hevur ikki fyri neyðini at fotelja okkum soleiðis, hvør hevur fíggjarligu ábyrgdina av landinum. Tað vita vit eisini sera væl. Hatta var ein óneyðug, vánalig og provokerandi útmelding at koma við, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum.

Starvsmannafelagið skal eisini samráðast við SEV, vísir Gunnleivur Dalsgarð á. Og hann vil hava greiðar fráboðanir, áðrenn farið verður til samráðingarborðið. Tí Starvsmannafelagið er ikki áhugað í at samráðast til ein sáttmála, sum tey aftan á fáa at vita, verður kolldømdur, sigur hann. Vit góðtaka tað stutt og greitt ikki, sigur hann.

# Verkfallið hevur onga avirkan

**Á havnarlagnum í Miðvági hevur Havnagrillin opið sum vanligt, hóast verkfall er. Einki manglar av nøkrum, og ætlanir eru um at leingja upplatingartíðirnar um vikuskiftini**

HANDIL
*Edvard Joensen*

**Miðvági:** Hóast verkfall er um alt landið, eru kortini støð, har arbeiðið gongur sum vanligt, og verkfallið onga ávirkan hevur. Eitt er Havnagrillin í Miðvági, sum heldur fer at leingja upplatingartíðirnar enn at stytta, sum so mong onnur gera.

Hóast flakavirkið liggur steindeytt á havnarlagnum í Miðvági, er lív í fyritøkuni hinumegin vegin. Havnagrillin, sum stendur undir berginum beint oman fyri flakavirkið hjá Føroya Fiskavirking, hevur opið sum vanligt.

— Hjá okkum hevur verkfallið onga ávirkan, sigur Erik Johansen, sum hevur Havnagrillina í Miðvági. Vit hava ta vøru, vit hava brúk fyri, og hava eisini fingið okkurt afturat, hóast verkfallið hevur vart í góðar fjúrtan dagar.



*Erik Johansen bakar pizza í Havnagrillini í Miðvági, sum hevur opið sum vanligt, hóast verkfall er um alt landið*
*Mynd: Edvard Joensen*

Eingin munur er á útboðnum í dag og tí, sum var, áðrenn verkfallið byrjaði, sigur hann. Tað verið seg vanligur grillmatur, búffar ella tað nýggjasta, hann er farin undir. At baka pizza.

— Alt er famvegis at fáa, sigur hann. Eisini eitt sindur av kioskvørum sum søtmeti og sigarettir, vísir hann á og peikar yvir á ein hill við síðna av kuldaskápinum við sodavatni.

— Men tað er lítið, tí eingin tímir rætiliga at keypa snús, sum luktar og smakkar av grill, flennir hann. Og tað ger tað veruliga, leggur hann afturat. Verður vøran liggjandi ov leingi í rúminum, festir grillroykurin seg í hana. So tað ræður um at hava lítla goymslu av slíkum og heldur fáa oftari tilført.

Havnagrillin hevur vanligar dagar opið til klokkan 23.00 á kvøldið. Eitt sindur longri um vikuskfiftini, sigur Erik Johansen. Men nú fer hann at hava upp aftur longri opið um vikuskiftini, sigur hann.

— Fólk koma framvið at keypa ein enskan ella franskan búff ella kanska eina pizza at taka heim við sær, og tað ber væl til, sigur hann. So mikið væl, at hann heldur grundarlag vera fyri at hava longri opið.

— Hatta við búffunum hevur verið eina tíð. Men pizzbakingin er nýggj. Og henni hava fólk tikið væl ímóti, sigur Erik Johansen í havnagrillini í Miðvági.